# Framleiða portiónir í Saltangará



*Jason Johannesen hevur verið við í allari menningini av fiskivinnuni á landi.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Í fleiri ár hevur virkið hjá Fiskavirking í Saltangará framleitt blokk í stórum nøgdum, men seinni í ár fer virkið ætlandi eisini at framleiða portiónir til útflutnings**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað kemur ikki so illa við hjá øllum virkjum, at flotin liggur, og eingin fiskur kemur uppá land teir fyrstu dagarnar í hesum árinum.

### Flyta maskinur

- Vit verða ikki klárir at taka ímóti fiski hesa vikuna - og neyvan í komandi viku heldur, sigur virkisleiðarin á Fiskavirking í Saltangará, Jason Johannesen.

Á virkinum hava tey nevniliga úr at gera, nú ein partur av bygninginum, sum er bygdur uppí suðureftir, verður tikin í nýtslu.

- Fyribils flyta vit nakrar av verandi maskinum suður í henda partin av bygninginum, men seinni í heyst fáa vit so eisini tvær nýggjar flow-linjur ella reinskerilinjur, sum skulu setast uppá virkinum. Eisini fáa vit ein bandfrystara, sum skal frysta portiónirnar, sum vit miðja eftir at framleiða seinni í hesum árinum, um vit náa so langt í ár, sigur Jason Johannesen.

Í fleiri ár hevur Fiskavirking í Saltangará burtur av virkað upsa til blokk, og hendan framleiðslan fer ætlandi at halda fram.

- Men sum frá líður, fara vit eisini at leggja okkum eftir at virka portiónir til útflutnings, sigur hann.

### Betri umstøður

Nýggju flow-linjurnar, sum skulu setast uppá virkinum, eru kendar frá øðrum virkjum í Føroyum. Tær eru meira sjálvvirkandi enn gomlu linjurnar, sum eitt nú eru á virkinum í Saltangará.

- Sum er, hava vit tríggjar av teimum gomlu reinskerilinjunum, har pláss er fyri 41 fólkum. Við nýggju flow-linjurnar verður pláss fyri 40 fólkum, og framleiðslukapasiteturin verður nakað størri enn í dag, tá ið hesar eru komnar upp at standa, sigur Jason.

Tá ið ein partur av maskinunum eru fluttar í nýggja bygningin, verða arbeiðsumstøðurnar á virkinum nógv betri.

- Á virkinum er nógv at gera í hesum døgum; gólv verða stoypt, rennur verða grivnar, og rør skulu leggjast, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari á Fiskavirking í Saltangará.


*Eftir at hava virkað blokk í fleiri ár, fer Fiskavirking í Saltangará eisini at virka portiónir.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Kalt og kavi, men ikki á jólum


*Tey høvdu einki ímóti at lata seg avmynda, tá ið Sosialurin datt fram við í Haldórsvík hóskvøldið.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

VETUR
*Vilmund Jacobsen*

Jólini vóru ikki hvít í ár og nýggjárið ei heldur. Men so skjótt, farið varð um ársskiftið, hvítnaðu fjøll og dalar - og nú, vit nærkaðust vikuskiftinum, eru Føroyar kavaklæddar, og tað er kalt í veðrinum.

Gott kavaveður, sum tey gomlu plagdu at taka til.

Nýggjársaftan var av besta veðri og øll, sum høvdu hug at leita sær út um um midnáttarleitið ella fyrr um kvøldið saman við børnunum, kundu gera tað uttan at hugsa um tøtt klæði og tjúkkar troyggjur.

Sýnið var gott hetta kvøldið, og tá ið leið út móti midnátt, gjørdist himmalin eitt fagurt lithav - næstan líka mikið, hvagar eyguni vendu.

Hóast ávaringar um ikki at senda út neyðrakettir hetta kvøldið, tí tær fóru at detta ov skjótt niðuraftur í góða veðrinum og tískil kundu elva til skaða, vóru nógvar slíkar at síggja á himmalinum á midnátt.

Jólini og nýggjárið, sum børnini gleða seg til, er farið aftur um, og gerandisdagurin er komin aftur - í einum nýggjum ári.

Børnini eru farin útaftur at spæla og kavin, sum onkur kanska saknaði á jólum, er nú komin.

Á stuttari ferð í Haldórsvík hóskvøldið tóku vit hesa myndina av trimum børnum, sum væl ílatin hugnaðu sær uttandura hetta kalda januarkvøld.

Genturnar eru og ferðast, nú áðrenn skúlin byrjar aftur mánadagin, og tá er stuttligt at hava vinfólk á staðnum, sum tíma at hugna sær úti millum húsanna.



# Gátuført handrit eftir William undan kavi

**Eitt liðugt skaldsøguhandrit eftir William Heinesen frá 1920-unum er funnið í gomlum bókarúgvum í Keypmannahavn. Talan er eitt óútgivið handrit, sum er umgyrt við nógvum mystikki. Ætlanin er at geva handritið út, sigur eigarin av Frederiksberg Antikvariat, sum hevur funnið skaldsliga skattin**


*Her millum hillar og bókafjøllini hjá Nørballe kom eitt ókent og gátuført skaldsøguhandrit eftir William Heinesen undan kavi*

BÓKASKATTUR
*Ingi Rasmussen*

Eitt liðugt redigerað handrit eftir William Heinesen, sum ongantíð er givið út, hevur ligið og savnað dust í Keypmannahavn síðan einaferð í 1920-unum.

Um talan er um eitt handrit, ið seinni er komið út sum bók, ella um talan er um eina skaldsøgu, ið ongantíð er útgivin, hevur ikki eydnast okkum at finna fram til enn.

Søgan byrjar fyri tveimum árum síðan, tá antikvarbókahandlari Jess Jessen keypti alt bóksavnið hjá navnframa Leif Nørballe. Nørballe var kendur fyri at eiga heil bókafjøll, sum hann og hansara kundar í Gammel Kongegade kundu villast burtur í.

Jess Jessen, sum eigur og rekur Frederiksberg Antikvariat, hevur funnið nógvar bókligar dýrgripir millum tilfarið. Fyri okkum føroyingar er tað serliga spennandi, at hann kom fram á eitt handrit eftir okkara kendasta skald, William Heinesen.

### Ætlar at geva út

Nú ætlar Jess Jessen sambært Politiken at geva handritið út sum ljósprentað eftirmynd.

»Det er et færdigredigeret romanmanuskript fra 1920-erne på 358 sider, som Otto Gelsted afviste på Munksgaards forlag. Hvis vi kan blive enige med Heinesens arvinger, udsender vi det som et manuskript í faksimile,« sigur Jess Jessen við Politiken 30. desember.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið fatur á Jess Jessen fyri at fáa at vita, hvat handrit talan er um, og keldur innan føroyska bókaheimin kenna heldur onki til handritið.

Gátuførið er stórt um handritið, tí sjálvt ikki sonur Williams, Zacharias Heinesen, veit enn, hvør tittulin á ókendu skaldsøguni er.

– Vit hava verið í sambandi við handan mannin, men hava ikki fingið at vita enn, hvat handrit talan er um. Sjálvandi ætla vit at lesa tað væl, áðrenn vit geva loyvi til, at tað verður givið út, sigur Zacharias Heinesen við Sosialin.

### Kritiskur vinur

Otto Gelsted var bæði persónligi vinur og meistari Williams, og hann las nógv av tí, sum William Heinesen skrivaði, áðrenn tað varð givið út.

– Pápi skrivaði nógv til forlagið Munksgaard og fekk fólk at lesa tilfarið ígjøgnum, tí hann vildi ikki geva nakað vánaligt út. Serliga Gelsted var kritiskur, og tað var pápi øgiliga glaður fyri, sigur Zacharis Heinesen, sum er spentur at hoyra aftur frá danska antikvarbókahandlinum.

Talan kann sjálvandi vera um eitt nú »Blæsende Gry«, sum seinni kom út sum fyrsta bókin hjá Williami. Talan kann eisini vera um onkra aðra bók, sum seinni er komin út umskrivað. Er tað ein bók, sum seinni er givin út, so er tilfarið kortini áhugavert. Men er tað ein bók, sum ongantíð er útgivin áður, so er talan um onki minni enn eina skaldsliga sensatión.

Tað frætta vit meira um seinni, tá vit hava grópað víðari í bókarúgvunum.

# Kanningin kostaði 300.000 krónur

**Hóast kanningin av embætisførsluni hjá Jørgin Niclasen hevur kostað skattgjaldaranum dýrt, dregur tað út hjá almenninginum at fáa at vita, um hon verður tikin fyri fult. Landsstýrismálanevndin er liðug við málið, nú stendur tað til løgmann ella løgtingið at seta punktum**

KANNING
*Ingi Rasmussen*

Skattgjaldarin hevur goldið 300.000 krónur fyri at løgtingið hevur kannað embætisførsluna hjá Jørgin Niclasen landsstýrismanni við fiskivinnumálum.

Men hóast kanningin er komin til ta niðurstøðu, at skeiv málsviðgerð og vantandi metingar í Fiskimálaráðnum førdu til milliónatap hjá landskassanum, tá lánini hjá tveimum rækjutrolarum vórðu løgd um, so er framvegis óvist, hvørja lagnu kanningin fær fyri landsstýrismannin.

Løgmaður, sum skal hava eftirlit við, at hansara landsstýrismenn røkja sítt starv á fullgóðan hátt, vil framvegis ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið. Hóast løgtingið hevur sett fólk at gera eina rúgvusmikla kanning, ið kostaði skattgjaldaranum fitt av peningi, so tykist hann ikki rættiliga at hava álit á kanningini, tí hansara umsiting er farin at kanna kanningina hjá kanningarstjóranum.

Løgmaður sigur kortini so mikið, at ein slík kanning ikki kann fara aftur við borðinum.

### Nevndin er liðug

Tað var Finnbogi Ísakson, fyrrverandi løgtingsformaður, sum heitti á Turið Debes Hentze advokat um at standa fyri kanningini.

Kanningarstjórin kom til tað úrslit, at Fiskimálaráðið í tveimum førum hevur verið á samanstoytskós við lógina um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan, og tað hevur sett almennan pening í vanda. Talan er um 11 milliónir almennar krónur, sum fóru fyri skeyti, tá lánini til Høgafoss og Atlantic Viking vórðu løgd um.

Jørgin Niclasen hevur ábyrgdina fyri, at málsviðgerðin í hansara umsiting er røtt, men hann vil kortini ikki viðurkenna, at nakar feilur er gjørdur. Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum, hevur somuleiðis sátt iva um kanningina.

Tað var annars landsstýrismálanevndin hjá løgtinginum, sum reisti málið, men nú kanningin er handað løgtinginum, er hennara leiklutur liðugur í málinum.

Taka hvørki løgmaður ella landsstýrismaðurin sjálvur avleiðingar av málinum, stendur tað til løgtingið at gera av, um eitt misálit skal reisast móti landsstýrismanninum. Verður eitt misálit samtykt við vanligum meiriluta, noyðist landsstýrismaðurin frá.